# UMSÓKN UM STUÐUL TIL FILM
## -skal sendast sum word ella pdf-skjal til
## ammr@ammr.fo

*Tilskilað Almanna- og mentamálaráðnum*

| Journal nr. |
|---|
| |

## A)
### Upplýsingar um umsøkjara

*(spjaldrastavir)*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fornavn: | | Eftirnavn: | |
| Føðingardagur: | | P-tal: | |
| Gøta: | | Telefonnr.: | |
| Postrúm: | | Teldupostur: | |
| Bygd/býur: | | | |

### Møguligt framleiðslufelag

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn: | | V-tal: | |
| Gøta: | | Telefonnr.: | |
| Postrúm: | | Teldupost: | |
| Bygd/býur: | | | |
| C/o: | | | |
| Ábyrgdarpersónur: | | | |

## B)
### Stuðul verður goldin um Føroya Gjaldstovu

| | | | |
|---|---|---|---|
| | ☐ Útgjald til umsøkjara ☐ Útgjald til framleiðslufelag (set kross) | | |
| Peningastovnur: | | | |
| Skrás.nr.: | | Kontunr.: | |

## C)
### Søkt verður um stuðul til (møguleiki er fyri at seta fleiri krossar)

| | |
|---|---|
| Heiti á verkætlan: | |
| Tættir innan filmsgerð, søkt verður um stuðul til: | ☐ Søgu- og hugskotsmenning<br>☐ Undanframleiðslu ☐ Framleiðslu ☐ Eftirframleiðslu<br>☐ Útbreiðslu ☐ Annað _____ |

## D)
## Slag av verkætlan

| | |
|---|---|
| Slag av verkætlan: | ☐ Stuttfilmur ☐ Novellufilmur ☐ Spælifilmur<br>☐ Dokumentar ☐ Sjónvarpsfilmur ☐ Listarfilmur<br>☐ Annað _____ |
| Longd á filmi, umleið: | |

## E)
## Lýsing av verkætlanini og tíðarætlan (kann eisini verða lagt við sum skjal – sí F) viðv. luttakarum)

| Lýsing av endamálinum, ið søkt verður um stuðul til: |
|---|
| |

**Tíðarætlan. Gev gætur at stuðul ikki verður latin til arbeiði, ið longu er gjørt ella afturvirkandi!**

| | |
|---|---|
| Forarbeiði: | |
| Upptøka: | |
| Eftirarbeiði: | |
| Frumframførsla: | |
| Annað: | |

**F)**

**Fólk í framleiðsluni, sí vegleiðingina viðv. A-funktiónum. Nevn bert luttakarar, ið skrivliga hava váttað luttøku.**

| | |
|---|---|
| Leikstjóri:<br><br>_____ | Aðrar royndir/kvalifikatiónir ella viðheft CV: |
| Framleiðslustjóri:<br><br>_____ | Aðrar royndir/kvalifikatiónir ella viðheft CV: |
| Rithøvundur:<br><br>_____ | Aðrar royndir/kvalifikatiónir ella viðheft CV: |
| Fotografur:<br><br>_____ | Aðrar royndir/kvalifikatiónir ella viðheft CV: |
| Ljóðfólk:<br><br>_____ | Aðrar royndir/kvalifikatiónir ella viðheft CV: |
| Klippari:<br><br>_____ | Aðrar royndir/kvalifikatiónir ella viðheft CV: |
| Leikarar:<br><br>_____<br><br>_____<br><br>_____<br><br>_____ | Aðrar royndir/kvalifikatiónir ella viðheft CV: |
| Onnur fólk:<br><br>_____<br><br>_____<br><br>_____<br><br>_____ | |

## G)
## Fíggjarætlan (kann eisini verða løgd við sum skjal)

Mettar útreiðslur og mettar inntøkur:

| Útreiðslur: | | Inntøkur: | |
|---|---|---|---|
| | | Eginpeningur: | |
| | | Stuðul frá øðrum: | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | Søla: | |
| | | Aðrar inntøkur: | |
| | | | |
| | | | |
| Tilsamans: | | Tilsamans: | |

| | |
|---|---|
| Samlaður fíggjartørvur: | |
| Søkt verður um kr.: | |

| |
|---|
| Upplýs her annan stuðul, ið áður er fingin frá filmsjáttanini. Tað kann vera til annan ella sama tátt í verkætlanini, sum søkt verður um stuðul til við hesi umsókn: |
| |

## H)
## Aðrar upplýsingar av týdningi fyri viðgerðina

| |
|---|
| Grundgev fyri, hví stuðul eigur at verða játtaður til verkætlanina: |
| |

## I)
## Hjáløgd skjøl, CV o.a. Øll viðkomandi skjøl skulu sendast við, hóast stuðul er latin fyrr til somu verkætlan.

| |
|---|
| Hjáløgd skjøl (vinaliga nevn hesi): |
| |

## J)
## Váttan

________________________________________________

Dagfesting og undirskrift umsøkjarans

# VEGLEIÐING TIL UMSÓKN UM STUÐUL TIL FILM

A)
**Upplýsingar um umsøkjara og møguligt framleiðslufelag**
Fyri at kunna gjalda játtaðan stuðul til
a) privatpersón skal føðingardagur og p-tal upplýsast
b) framleiðslufelag skal v-tal upplýsast

**GG! Samsvar skal vera millum navn á umsøkjara og navn á kontuhavara í teigi B**

Hevur framleiðslufelagið sjálvstøðugan bústað, verður hesin upplýstur. Um framleiðslufelagið hevur bústað hjá privatpersóni, t.d. formanni ella kassameistara, verður hesin upplýstur (brúka tá co: teigin til navnið á viðkomandi privatpersóni).

Upplýst eigur at verða, hvør er ábyrgdarpersónur fyri felagið.

B)
**Stuðul verður goldin út um Føroya Gjaldstovu**
Samsvar skal vera millum teig A og B uttan mun til, um tað er ein privatpersónur ella framleiðslufelag, ið søkir um stuðul.

C)
**Søkt verður um stuðul til**
Biðið verður um upplýsing um heiti á verkætlanini. Talan kann vera um endaligt ella fyribils heiti. Um einki heiti er, verður tað eisini upplýst.
Biðið verður um upplýsingar um, hvat slag av tátti í filmsgerð, talan er um. Møguleiki er fyri at søkja stuðul til fleiri tættir.

D)
**Slag av verkætlan**
Biðið verður um at upplýsa slag av verkætlan og væntaðu longdina av filminum.

E)
**Lýsing av verkætlanini, ið søkt verður um stuðul til og tíðarætlan**
**GG! Stuðul verður ikki latin afturvirkandi! Sí** F) **viðv. luttakarum.**
Biðið verður um ymiskar upplýsingar um tiltakið, harundir t.d.:
- stigtakari/-takarar
- hví farið verður undir tiltakið
- verkætlanargongdin higartil og núverandi støða
- synopsa, samandráttur
- hvørjir møguligu samstarvspartarnir eru (bæði føroyskir og útlendskir)
- til hvønn tiltakið er stílað (málbólkur)
- hvørji úrslit, ein væntar at røkka
- hvønn týdning mett verður, at verkætlanin hevur

Er leikrit tøkt, verður tað sent við umsóknini.

Undir “Tíðarætlan” verður biðið um upplýsingar um væntaðu tíðarætlanina fyri verkætlanina.

F)
**Fólk í framleiðsluni**
Biðið verður um upplýsingar um framleiðsluliðið, og hvørjir luttakararnir eru. Tað hevur týdning at nevna øll, ið eru við í framleiðsluni sum partur av at lýsa verkætlanina so neyvt, sum til ber.
Fyri A-funktiónir verður biðið um eitt “Letter of Intent”. A-funktiónir eru tær týdningarmestu funktiónirnar í eini framleiðslu, eitt nú leikstjóri, fotografur og framleiðslustjóri.
GG! Nevn bert luttakarar, ið skrivliga hava játtað. Hetta kann hava týdning fyri gegnið í sambandi við viðgerð av umsóknunum.

G)

**Fíggjarætlan**

Biðið verður um, at útreiðslur og inntøkur verða so neyvt greinaðar, sum møguligt.

Heitt verður á umsøkjara um at halda seg til dagsins kostnað á t.d. ferðaseðlum, gisting og tilfari. Um serlig avtala er gjørd við ávísan tænastuveitara, eigur hetta at viðmerkjast.

Inntøkurnar eru at skilja sum stuðul, ið annar stuðulsveitari hevur latið, ella tað, ið ein roknar við at fáa, so fíggjarætlanin javnvigar. Hartil er neyðugt at upplýsa, um inntøkur eru frá sølu t.d. av atgongumerkjum, útgávum o.ø.

Fíggjartørvurin er at skilja sum munurin á útreiðslu- og inntøkuteigunum.

Biðið verður eisini um, at umsøkjari upplýsir annan stuðul, ið er fingin frá filmsjáttanini til somu verkætlan.

**GG! Teigurin ”søkt verður um kr.” eigur altíð at verða útfyltur.**

H)

**Aðrar upplýsingar av týdningi fyri viðgerðina**

Grundgev fyri, hví stuðul eigur at verða játtaður til endamálið.
Eru serlig atlit, ið hava týdning fyri umsóknina, er møguligt at nevna hesi í teigi H. Hetta kundi t.d. verið, um verkætlanin er serliga kostnaðarmikið og nevna orsøkirnar fyri hesum.

I)

**Hjáløgd skjøl**

Um skjøl verða send saman við oyðublaðnum, t.d. leikrit, útgreinað fíggjarætlan, CV ella ummæli o.s.fr., eiga hesi at verða nevnd í teigi I.
Gjørt verður vart við, at skjøl skulu sendast við, hóast verkætlanin ella tátturin í eini verkætlan áður hevur fingið stuðul.

J)

**Váttan**

Vinaliga vátta og dagfest umsóknina, áðrenn hon verður send Almanna- og mentamálaráðnum. Um umsóknin verður send Almanna- og mentamálaráðnum við telduposti, verður navnið á umsøkjaranum roknað sum váttan ístaðin.

**GG! Umsóknir, ið eru latnar inn, eftir at freistin er úti, verða sum høvuðsregla ikki viðgjørdar.**

**GG! Stuðul verður ikki latin afturvirkandi til verkætlan, ið longu er framd, ella til tátt, sum er framdur í verkætlan, sum er í gongd**

**GG! Vart skal eisini gerast við, at ikki brúktur stuðul í játtanarárinum sum høvuðsregla ikki verður fluttur yvir um fíggjarár og fellur tí aftur í landskassan.**